# Tað var eg

Sára Thomsen

Miðnám á Kambsdali 2023

*Nú eru tvær vikur, síðan líkið av einum 16 ára gomlum drongi var funnið í viðarlundini í Havn. Maðurin, ið fann líkið, var farin ein rennitúr klokkan hálvgum seks hendan morgunin. Hann var komin hálvan vegin á túrinum, tá hann rann seg fram á ein skógv. Hann undraðist á, hví ein skógvur lá mitt á gøtuni í viðarlundini, hugdi rundan um seg og legði merkis til, at har fleyt okkurt í dunnuhylinum. Eitt lík.*

Eg leggi telefonina frá mær, tími ikki at lesa meira um hasa søguna nú. Hon er at hoyra í tíðindunum hvønn dag. Eg haldi í grundini ikki, at eg hoyri útvarpið tosa um annað fyri tíðina. Tað gevur meining, tí tað henda ikki nógv morð í Føroyum Eg hyggi at klokkuni. 07:50. Á nei, eg verði ov sein í skúla, um eg ikki skundi mær nú. Mamma hevur sagt, at um eg missi so mikið sum ein tíma afturat, so missi eg mínir lummapengar. Tað kann eg ikki, eg tími ikki at fáa mær eitt arbeiði. Tíbetur búgvi eg beint við skúlan, so eg skal ikki skunda mær so nógv.
Tað er spakuliga byrjað at vára, døgg sæst á rútum, og blómur spíra. Mær dámar betur veturin, tí um várið og summarið er tað er alt ov ljóst um morgnarnar. Eg festi mær í sigarettina, meðan eg spáki inn í skúlagarðin og heilsi uppá vinkonurnar, sum standa og roykja beint við borðini. Eg seti meg hjá teimum, varnist ikki klokkuna, sum ringir. Sama ger. Vit eru altíð ov seinar til morgunsang, tí hví skullu øll savnast í høllini og syngja ein sang? Skúlin er ov troyttandi í forvegin.
- Kom so folkens! Kjepp kjepp! Morgunsangurin byrjar hvørja løtu, keðiligt at missa tað.
Lærararnir taka tørn at reka borðini, og í dag er tað ítróttalærarin, Hanus, sum er tann hepni vinnarin. Hann er tann strangasti, tá tað kemur til sovorði og brennir veruliga fyri, at øll eru við til morgunsang. Eg hoyri suff og onkran, ið gremur seg. Eg tveiti hálvu sigarettina niður og síggi aðrar verða blakaðar og trampaðar rundan um meg.
Eg kann lova tær, at hesin dagurin er tann longsti av teimum øllum. Vit eru so heppin, at drongurin, ið doyði, gekk á okkara skúla, og vit hava havt eina minnisløtu fyri honum hvønn morgun síðan hendingina. Kann tað ikki bara halda uppat?
Eg gangi eftir gongini til síðsta tíman. Plakatir hanga allastaðni. Á onkrari stendur “Hvíl í friði Liam”, á einari aðrari “Flúgv millum einglarnir”. Eg kundi spýð. Vit hava føroyskt, og eg eri tann síðsta at koma í stovuna. Tað einasta lediga plássið er við síðuna av Marnu. Marna er – orsaka meg, var – daman hjá Liam. Eg burdi tikið synd í henni, men tað fái eg ikki.
- Átta tímar! Átta fokking tímar eru vit fangað inni í hesum fongslinum. Fyri hvat? At læra? Fanans tíð! Tað er Anita, sum øsir seg, tá tað endiliga ringir út. Hon viftar við uppgávuni, sum vit hava fingið fyri. Hon muttlar okkurt afturat um órættvísi og ... nei, eg fangi ikki, hvat annað hon sigur.
Heimkomin seti eg meg við skrivaraborðið í kontórinum hjá okkum. Eg lati telduna upp og fari inn á Google. Heri í flokkinum hevur lært meg, hvussu eg kann koyra Google á “incognito mode”, so tá ið

eg fari av síðuni, hvørvur alt tað, ið eg havi søkt. Smart. Eg kanni, hvussu langt tey eru komin við at uppklára morðið á Liam. Eg brúki tveir tímar at leita á netinum, men tey eru ikki komin langt. Tey hava havt nøkur fólk undir illgruna, men eingin er ákærdur , tey hava ikki funnið nakran tráð enn. Eg haldi, hetta er nokk fyri í dag. Eg klappi telduna saman.
Klokkan er bara fimm, so døgurðin verður ikki klárur fyrr enn um ein tíma. Eg fari undir brúsu, meðan eg bíði. Eg havi keypt sama shampoo, sum ein vinkona hjá mær brúkar. Tað er ein two-in-one-dunkur frá Head and Shoulders. Hon plagar at stjala tað frá beiggja sínum. Eg skilji ikki, hví hon brúkar hettar lortið, tí hárið verður so vemmiligt av tí. Hon vísti mær eisini perfumuna, sum hann brúkar, og tá hon ikki hugdi, stappaði eg hana í lumman.
Mamma rópar á meg at koma og eta døgurða. Eg turki mær, og eg eri líka við at sproyta mína vanligu perfumu á. Eg renni oman trappurnar, og lukturin av lasanju kemur ímóti mær. Nústaðni føli eg, hvussu búkurin rumblar.
Eg fái mær upp á tallerkin og fari upp í kamarið. Mamma er ikki serliga glað fyri, at eg ikki eti saman við henni og sjeikinum, men vit skeldast ikki um tað longur. Tíbetur, tí eg orki ikki at hoyra røddina á henni. Á borðinum í kamarinum er ikki nógv pláss eftir við øllum teimum skitnu tallerkunum og koppunum, eg havi samlað tann seinasta mánaðin. Mamma var og samlaði teir saman ein dagin, men hon fekk ikki borið allar, so tað liggja nakrir eftir.
Onkur bankar á hurðina, og mamma letur upp. Áðrenn eg nái at biðja hana sleppa sær til helvitis, sigur hon, at hon fer at leggja seg, og at eg burdi gjørt tað sama, um eg skal orka í skúla. Ha! Hvønn heldur hon meg vera? Marnu? Hon letur hurðina aftur eftir sær. Tá klokkan slær midnátt, fari eg á føtur og sníki meg út í gongina, taki ein gamlan jakka, sum eg ikki brúki longur, og einar svartar skógvar. Eg taki pabbasa gamla grindaknív, tí sum man sigur "knívleysur maður er lívleysur maður". Tað burdi hann havt hugsað um, áðrenn hann fór út hina náttina og aldrin kom aftur. Eg skundi eg mær eisini inn á vesið eftir perfumuni hjá beiggjanum hjá vinkonuni hjá mær.
Eg spaseri yvir til grillbúðina Staðið. Her er óvanliga friðarligt í kvøld. Perfekt. Eg keypi mær eina pylsu og eitt breyð og festi mær í sigarettina. Eg seti meg við eitt borð í skúlagarðinum, júst sum eg gjørdi fyrr í morgun. Tað er púra friðarligt. Eg hoyri ikki eitt kis. Einki hóvasták eina vanliga mikunátt. Eg gangi fram við kaiini og landssjúkrahúsinum og fari oman í Sandágerð. Har stendur hann, Pætur. Júst sum vit avtalaðu í gjár. Vit heilsast og ganga eitt sindur til síðis. Hann tosar, og eg fái ikki eitt orð við av tí, sum hann sigur. Eg havi summarfuglar í búkinum. Eg andi djúpt, klemmi fast um grindaknívin í lummanum og smílist til mítt næsta offur.